# Stranda skúli
# Menningarætlanir



Innihald


| | |
|---|---|
| Bókasavnið | s. 2 |
| Námsfrøðiliga ráðið | s. 6 |
| Sorg-tilbúgving | s. 9 |

# Menningarætlan - Bókasavnið

## Lesiætlan fyri bókasavnsundirvísing

### Yvirorðnað mál við bókasavnsundirvísingini:

- At geva teimum, ið nýta bókasavnið, t.v.s. næmingum og lærarum (í ein ávísan mun eisini fólk "uttanífrá") eina neyðuga vitan og førleika til tess at ogna sær vitan og gagnnýta teir nógvu og fjølbroyttu møguleikarnar á bókasavninum til sjálvstøðug avrik, -ein kelda til vitan, upplivingar, upplýsing, samskifti, gleði og stuttleika.

### Partmál:

- at gera næmingarnar tryggar í bókasavnsumhvørvinum
- at geva næmingunum vitan og tilvitan um ymiskar hættir at leita
- at geva næmingunum møguleika til sjálvi at finna og viðgera upplýsingar
- at geva næmingunum møguleika til at velja millum ymiskar arbeiðshættir í samband við t.d. verkætlanir.

# Innihald:

## 1.-3. flokkur

So skjótt, sum næmingarnir eru innskrivaðir í skúlan, eiga teir regluliga at vitja á bókasavninum fyri at fáa upplýsingar og kunnleika um tað.

## Ì 1.-3. flokki skulu børnini

- vitja skúlabókasavnið, vera til staðar har, kenna seg heima har
- fáa at vita, hvar "teirra" bøkur eru
- uppliva bøkurnar (blaða, hyggja, tosa um, "lesa sjálvi", upplestur)
- finna og velja bøkur
- læra at nýta tólini til útlán
- lána bøkur til sjálvlestur og upplestur heima og í skúlanum
- geva øðrum lut í teirra upplivingum/vitan við millum annað at hava framsýningar av tekningum og dramatiseringar av eini (upp)lisnari bók

## 4.- 6. flokkur:

Børnini eru nú so von við at nýta bókasavnið, at tey kenna seg sum heima har við tess funktiónum.

- munurin millum fak- og fagurbókmentir
- upstilling av bókunum
- leitan í innanhýsis (ella uttanhýsis) basum

## <u>7 - 8 flokk</u>

Arbeiða framvegis við uppsetan av bókum.
Leitan í innanhýsis og uttanhýsis basum.

## <u>Tilfar og fyriskipan</u>

Bókavørðurin skipar fyri bókasavnsfrálæruni í samstarvi við flokslæraranum ella annan lærara, ið nýtur bókasavnið saman við næmingum. Tilfarið til endamálið er á bókasavninum.

# Tíðarætlan

Saman við flokslærunum leggur skúlabókavørðurin frálæruna soleiðis til rættis, at allir flokkar fáa tann kunnleika, sum svarar til aldur, áhuga og tørv.

# Bókasavnsundirvísing fyri 1. til 8. flokki.

## 1. – 3. flokkur

| Ætlan | Innihald | Uppgávur |
|---|---|---|
| Næmingarnir skulu læra bókasavnið at kenna.<br>Teir skulu læra at vera í rúminum<br>Næmingarnir skulu læra at kenna bókasavnið sum eitt stað, har teir bæði kunnu fáa vitan og upplivingar | Næmingurin skal læra rúmið at kenna<br>Teir skulu vita, hvar teir skulu finna síni "ting"<br><br>Kunningarrenning | 1 |
| Næmingurin skal motiverast til at lána bøkur | Upplestur<br>bókaummæli | 1 |
| Næmingurin skal sjálvur læra at lána bøkur. | Næmingurin lænur bøkur heim við | 1 |
| **4.- 6 flokkur** | | |
| **Ætlan** | **Innihald** | |
| Næmingurin skal læra bókasavnið betur at kenna, soleiðis, at hann lættari finnur tað, hann hevur brúk fyri | Næmingurin skal finna út av, hvat stendur á teimum ymsu hillunum á bókasavninum | 2 |
| Hann skal læra at kenna mun á yrkisbókmentum og fagurbók-mentum<br>Hann skal læra, hvussu bøkurnar standa | Finna fagurbókmentir<br>Finna yrkisbókmentir<br>Læra at brúka "barnaplakatina" | 3 - 7 |
| Finna út av, hvørjar handbøkur og alfrøðir eru á bókasavninum | Leita eftir upplysningum í handbókum og alfrøðum | 8 - 11 |
| Gerast meira vitandi um, at uplýsingar finnast aðrastaðni enn í bókum | Leita í bókasavnsprogrammum og leitiskipanum á bókasavninum | |

# Bókasavnsfrálæra í 7 - 8 flokki

| Ætlan | Innihald | fylgiskjal/uppgávur |
|---|---|---|
| **Næmingarnir skulu vera sjálvstøðugir** | | |
| Næmingarnir skulu framhaldandi lána og lesa fagrar bókmentur frá bókasavninum | a. bókaummæli<br>b. lesa upp<br>c. koma við hugskotum um keyp av bókum<br>d. velja eina bók hvønn mánað. | 12 - 16 |
| Næmingarnir skulu leita, taka støðu til og velja tilfar bæði á skúlabókasavninum og á øðrum søvnum - eitt nú á býar ella landsbókasavninum | a. leita eftir tilfari á skúlabókasavninum ella uttanfyri skúlans gátt.<br>b. leita eftir tilfari við teldu á útlendskum søvnum | 17 - 24 |
| Næmingarnir skulu læra at tonkja í breiðum samanhangi | a. næmingarnir skulu kenna allar teir møguleikar,sum bókasavnið á skúlanum hevur at bjóða.<br>vit tosa um uppsetan av t.d.eini verkætlan ella blaði. | |
| Næmingarnir skulu uttan nakað kunna arbeiða sjálvstøðugir og hava eina ávísa ætlan - tá arbeitt verður við eini verkætlan | a. raðfesting og at fullføra eina verkætlan | saman við floks - læraranum |

# Menningarætlan - Námsfrøðiliga ráðið

Ískoyti til kunngerð um námsfrøðiliga ráðið.

- Byrja fundin við at lesa fundarfrágreiðingina frá seinasta fundi.
- Næsta punkt á skránni er at eftirmeta tær avgerðir, sum eru tiknar og at eftirmeta tey tiltøk, sum hava verið síðani síðsta fund.
- Lærugreinabólkar verða settir á fyrsta fundi í skúlaárinum, so lærararnir kunnu viðgera og menna lærugreinirnar.
- Við ársbyrjan verða fastir dagar ásettir, nær fundirnir skulu verða. (Vísandi til & 3 stk. 5 skulu í minsta lagi 6 fundir verða árliga.)
- Trivnaður millum lærarar hevur stóran týdning, og tí verður settur ein trivnaðarbólkur við fýra lærarum, sum verður valdur fyri eitt ár í senn. Trivnaðarbólkurin verður valdur á fyrsta fundi í skúlaárinum.

# KUNNGERÐ NR. 88 FRÁ 7. JUNI 2005 UM NÁMSFRØÐILIGA RÁÐIÐ

---

**Kunngerð nr. 88 frá 07.06.2005** '); document.writeln(''); } //-->

---

Nr. 88 7. juni 2005

Við heimild í § 9, í løgtingslóg nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o.ø. ásetur landsstýrismaðurin hesar reglur um námsfrøðiligt ráð:

*Endamál*

**§ 1**. Á hvørjum skúla, sum skipar fyri útbúgvingum sbrt. § 2 í omanfyri nevndu lóg, verður skipað eitt námsfrøðiligt ráð at ráðgeva skúlastjóranum.
*Stk. 2*. Námsfrøðiliga ráðið skal ummæla øll mál, sum leiðslan leggur fyri tað, ella sum er ásett sbrt. lóg.
*Stk. 3*. Námsfrøðiliga ráðið hevur hvørki rætt ella skyldu til at úttala seg um viðurskifti hjá tí einstaka læraranum.

*Limir*

**§ 2**. Limir í ráðnum kunnu vera øll tey starvsfólk, ið hava undirvísingarligar og aðrar námsfrøðiligar uppgávur í skúlanum.
*Stk. 2*. Lærarar, sum hava færri enn 6 pultstímar um vikuna, eru ikki limir í ráðnum.
*Stk. 3*. Limir hava skyldu at vera á ráðsfundum. Forfall, sum ikki er orsakað av sjúku, skal skrivliga verða boðað formanninum fyri fundin.
*Stk. 4*. Námsfrøðiliga ráðið kann loyva øðrum enn teimum í stk. 1 nevndu limum at taka lut á fundum.

*Fundarskipan*

**§ 3**. Skúlastjórin er formaður í ráðnum og leiðir fundirnar. Námsfrøðiliga ráðið velur skrivara millum limirnar.
*Stk. 2*. Um skúlastjórin hevur forfall, tekur varaskúlastjórin formanssæti.
*Stk. 3*. Skúlastjórin kann heita á onkran annan ráðslim um at stjórna fundunum.
*Stk. 4*. Námsfrøðiliga ráðið heldur fund, tá ið formaðurin heldur tað vera neyðugt.
*Stk. 5* Ráðið eigur at hava í minsta lagi 6 fundir í hvørjum skúlaári. Fundirnir skulu ikki verða hildnir í undirvísingartíðini.
*Stk. 6*. Formaðurin ásetir fundartíð og -stað, boðar limunum til fundar og ger fundarskrá.

**§ 4**. Lýst verður til fundar í námsfrøðiliga ráðnum á hóskandi staði í skúlanum. Fundarboð eiga vanliga at verða givin við í minsta lagi 7 daga freist, men kunnu vegna átroðkandi umstøður verða givin við styttri freist.

*Stk. 2*. Uppskot til fundarskrá skulu verða skrivlig og verða formanninum í hendi í seinasta lagi 4 dagar fyri fundin. Fundarskráin skal verða lýst í skúlanum 2 dagar fyri fundin.

*Gerðabókin*

**§ 5**. Eftir hvønn fund verður fundarfrásøgn førd í gerðabókina, sum verður undirskrivað av skrivara og formanni.
*Stk. 2*. Gerðabókin verður løgd fram í skúlanum í seinasta lagi 3 dagar eftir, at fundur er hildin, og hon liggur frammi í 2 dagar.

*Gildiskoma*

**§ 6**. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi rundskriv frá Direktoratet for søfartsuddannelsen nr. 20/75 og reglugerð fyri lærararáð Maskinskúlans frá 30. januar 1990

Mentamálaráðið, 7. juni 2005

**Jógvan á Lakjuni (sign.)**

landsstýrismaður

/Petur Petersen (sign.)

# Menningarætlan - Sorg-tilbúgving

## Sorgarætlan fyri Stranda skúla

í sambandi við álvarsliga sjúku,
vanlukku, deyða ella annan miss

---

**Inngangur**

Okkum, sum dagliga hava við børn at gera, er greitt, at børnini knýta seg tætt at teimum vaksnu, sum eru um tey í gerandisdegnum. Í dag er tað ofta soleiðis, at næmingarnir knýta seg sera tætt at okkum lærarum og starvsfólki annars á skúlanum. Vit fáa at vita um tær stóru hendingar, sum næmingunum hava verið fyri, og fáa høvi at taka lut í gleði og sorg næminganna.

Tað er lætt, tá ið tað snýr seg um gleðiligar tilburðir í lívi næminganna, men torførari, tá ið tað snýr seg um sorg og syrgiligar tilburðir, sum summir næmingar tíverri ikki sleppa undan.

Tað liggur eisini í tíðini at seta orð á øll fyribrigdi, sum henda í lívsins viðurskiftum. Tað, sum fyrr var friðhalgað at tala um og tagt burtur, elvdi stundum til sálarliga innilokan, einsemi og døpurhuga, sum so aftur elvdu til forðingar fyri menning og læring.

Henda sorgarætlan skal vera amboð okkara at nýta í teimum førum, har vit hava onkran, sum verður raktur av sorg. Hon skal somuleiðis gera okkum lærarar og starvsfólk á skúlanum tilvitað um tann leiklut, sum vit hava í arbeiði okkara, tá ið tað snýr seg um at hjálpa teimum næmingum, vit hava ábyrgdina av.

Endamálið er sostatt í greiðum orðum at siga, hvussu vit gera, tá sjúka,  vanlukka ella deyði rakar okkum í skúlanum ella ein av okkara nærmastu. Vónandi kann tilbúgvingarætlanin lætta um ta truplu støðu, vit eru í, tá sorgin rakar.

**Stuðulsbólkur**

Skúlin skal altíð hava ein stuðulsbólk. Í honum sita 3 áhugaðir lærarar.

**Uppgávan hjá stuðulsbólkinum er:**

- at virka sum stuðul, har tørvur er á tí
- at taka saman um og eftirmeta tiltøk í árinum, sum fór
- at fylgja við, hvat kemur út av viðkomandi tilfari og á annan hátt halda við líka og nema sær nýggja vitan um evnið
- at kunna nýggjar lærarar um tilbúgvingarætlanina
- at kunna heimini um tilbúgvingarætlanina

**Stuðulsbólkurin kann eisini:**

- skipa fyri fundum, fyrilestrum ella evnisdøgum
- kunna aðrar lærarar um nýtt tilfar, skeiðstilboð o.s.fr.

**Uppgávan hjá leiðsluni**

- Hava eina sorgarbók, har hendingar verða skrivaðar í, dagfestingar o.s.fr. Fylgja við teimum einstøku førunum
- Syrgja fyri, at flaggið kemur upp
- Syrgja fyri, at dagførdar telefonketur eru fyri hvønn flokk og lærararnar
- Taka sær av samskifti við fjølmiðlarnar
- Senda blómur/krans
- Søkja um kreppuhjálp (um neyðugt)

**Felags missur:**

Hevur næmingur verið leingi burtur vegna sjúku ella annað:

- flokslærarin/toymið tosa saman og tosa við foreldrini fyri at kunna seg um støðuna
- avtala kann verða gjørd við foreldur um kunning inni í flokkinum
- flokslærarin kunnar flokkin og starvsfelagar
- flokslærarin ella annar lærari, sum er tætt knýttur at næminginum, skipar fyri tiltøkum – t.d. vitjan á sjúkrahúsi ella heima, senda brøv/tekningar og føðingardagsgávu
- gera vitjanarlista í samráð við foreldrini
- flokslærarin syrgir fyri, at næmingurin verður kunnaður um tað, sum fyriferst á skúlanum, so hann alla tíðina kennir seg knýttan at hópinum
- flokslærarin kunnar toymið og hinar lærararnar við hóskandi millumbili um støðuna
- flokkurin ger tiltøk, tá ið næmingurin kemur aftur, t.d. hugnatíma

**Tá ið næmingur doyr**

Hevur næmingur verið leingi sjúkur:

- Flokslærarin boðar leiðsluni frá og leiðslan kunnar allar lærararnar um støðuna
- flokslærarin/toymið kunna flokkin
- morgunin eftir ella so skjótt til ber kunnar leiðslan allar næmingarnar um hendingina og greiðir somuleiðis frá, hví flaggað verður á hálvari stong
- saman við kunningini verður møguliga ein andakt – faðir vár, tendra ljós, blómur, tøgn í 1 minutt o.a.
- flaggið verður vundið á hálva stong

**Doyr næmingur brádliga**

- Tá ið deyðsboð eru, verða flokslær. og leiðsla kunnað
- Leiðslan ella flokslærarin seta seg í samband við heimið fyri nágreiniliga at vita, og hvussu støðan er
- leiðslan boðar til fundar, so skjótt boðini eru komin
- allir flokslærarar kunna flokkarnar og flaggið verður vundið á hálva stong
- skúlin samlast til andakt sama dag ella dagin eftir, flaggið verður vundið á hálva stong
- umráðandi er, at næmingarnir í flokkinum fáa høvi at tosa um hendingina; tí er neyðugt, at meira enn ein lærari er hjástaddur tann dagin. Geva rúm fyri, at næm. kunnu práta, spyrja og vísa kenslur, tímatalvan verður møguliga niðurløgd
- flokkurin og skúlin senda krans ella blómur
- flokkurin verður við til jarðarferðina saman við foreldrum sínum
- skúlin verður stongdur til jarðarferðina og flaggið á hálvari stong

- okkurt serligt verður gjørt við plássið hjá næm. nakrar dagar ella restina av skúlaárinum, t.d. mynd, blomstur, ljós o.a.
- ein limur úr sorgarbólkinum/stuðulsbólkinum verður knýttur at flokkinum
- møguliga skriva minningarorð
- føðingar- og deyðsdagurin verða merktir
- vitjan á grøvini
- flokkurin sendir heilsan heim til jóla

**Tá lærari doyr**

- leiðslan setur seg í samband við familjuna ella øvut
- leiðslan boðar til fundar og kunnar allar lærararnar (telefonketan) og morgindagurin verður lagdur til rættis
- flokslærarin/toymið fer inn við sínum flokki og kunnar næm., áðrenn øll hittast í høllini til eina minningarløtu
- flaggið verður vundið á hálva stong
- skipað verður fyri minningarsamkomu. Leiðsla ella annar lærari/prestur hevur eina minningartalu. Sangur, tala, faðir vár,ljós, tøgn 1 min.
- lærarar fara heim til familjuna.
- geva familjuni hjálp, t.d. til jarðarferðina
- skúlin er stongdur, tann dagin jarðarferðin er
- minningarorð í bløðini

**Missur hjá tí einstaka:**

Tá foreldur/systkin hjá næmingi verða rakt av álvarsligari sjúku ella vanlukku

- Flokslærarin ella annar lærari (sum næmingurin ella foreldrini føla seg knýtt at) kunnar allar lærararnar, sum hava flokkin, um støðuna.
- Hevur næmingurin onnur systkin í skúlanum, tosa allir lærararnir saman um støðuna.
- Tað er av stórum týdningi, at eisini hinir næmingarnir í flokkinum fáa at vita, hvat er hent. Hesi uppgávuni má flokslærarin taka sær av.
- Eisini má flokslærarin gera hinum næmingunum greitt, at viðkomandi næmingur, sum hevur sjúk foreldur ella systkin, kann hava ógvuliga skiftandi sinnalag/atburð.
- Kunna næmingarnar um sjúkuna.

**Tá næmingur missir foreldur ella systkin**

- Flokslærarin kunnar leiðslu og lærarar um tilburðin
- Flaggið verður vundið á hálva stong og umboð frá sorgarbólkinum kunna allar flokkarnar

- Flokslærarin/toymið kunnar flokkin og foreldur um tilburðin (t.d. foreldraumboðini)
- Vera inni í flokkinum, t.d. kann prestur vera hjástaddur
- Flokslærarin kunnar foreldur/avvarðandi og næmingin, at vit tosa um andlátið í tímanum (avmystifisera)
- Um systkin eru í øðrum flokkum, verður felags mannagongd fylgd í øllum avvarðandi flokkum
- Lærarar fara heim til familjuna og geva tilsøgn um hjálp, t.d. til jarðarferðina
- Flokkurin fær frí, tann dagin jarðarferðin er
- minningarløta verður hildin í flokkinum
- Vera um næmingin ta fyrstu tíðina aftaná (uml. 1 ár). Royna av og á at fáa eitt prát við næmingin, tá tað hóskar seg
- Flokkurin sendir blómu ella krans